ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 5. februar 2010




**Ynskilistin hjá Kerr**
Ongland
Danmark
Írland
Norðurírland
Liechtenstein
Føroyar

# Dreymabólkurin hjá Kerr

**Ongland, Danmark, Írland, Norðurírland og Liechtenstein. Tað eru londini, sum Brian Kerr helst vildi fingið úr UEFA-pottinum, tá lutakast verður sunnudagin**



jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk

Tað er sjálvandi ikki upp til landsliðsvenjaran sjálvan at gera av, hvørji liðini eru, sum koma úr pottinum. Og sum Brin Kerr staðfestir, so tryggja reglurnar jú eisini, at talan verður um javna spjaðing í styrkini av mótstøðuliðnum.

Sjálvur vil Kerr tí ikki seta nakra greining á, akkurát hvørji lond vildu verið tey bestu hjá okkum at fingið, men hann viðgongur, at eins og føroyski áskoðarin, so hevur hann eisini síni ynski.

– Av teimum sterkastu, er talan um ítróttarliga risauppgávu, líkamikið, hvørjum vit møta. Men eg kundi ímyndað mær, at føroysku áskoðaranir fegnir vildu havt Ongland og Danmark. Og úr triðja styrkislagnum vildi tað sjálvandi verið stuttligt hjá mær, um vit fingu Írland. Úr fjórðsterkasta pottinum haldi eg, at Norðurírland vildi verið spennandi – eisini tí vit áður hava fingið góð úrslit móti teimum, og so haldi eg, at Liechtenstein hevði verið fínt at fingi úr bólki fimm. Men hvør veit. Vit fáa neyvan øll av hesum, og skuldu tey bæði Írlondini gloppið, kundi eg hugsað mær Skotland og Wales, men vandin er jú eisini, at vit ikki fáa nakað av hesum liðum.

– Um hetta gjørdist lutakastið, so var talan um ein bólk, sum var fíggjarliga lokkandi. Sum hevði ítróttarligar møguleikar. Og sum eisini hevði sloppið okkum undan alt ov drúgvum ferðum.

## Avrikið er málið

Tá tosað verður um ítróttarligu møguleikarnar, er ein spurningur, um venjarin hevur sett sær nakran ávísan málsetning. Men í mun til Henrik Larsen, tá hann tók við, so vil Brian Kerr ikki seta nakað tal á, hvør føroyska úrtøkan skal verða.

– Tað er eingin orsøk at leggja nakað trýst á liðið í so máta. Tað týdningarmesta hjá okkum er, at vit fremja góð avrik. At vit betra okkum so nógv, sum vit á nakran hátt kunnu. Sjálv úrtøkan veldst jú um so nógv. Hvussu hópurin er fyri við skaðum og líknandi. Hvørji mótstøðuliðini verða, og so hava vit sjálvandi eisini hepni fyri neyðini.

– Hinvegin skulu vit sjálvandi ikki smæðist burtur. Megna vit at hava eins støðug avrik, sum vit høvdu í seinastu kapping, og kunnu vit fanga okkurt av hinum liðunum á einum ikki so góðum degi. So hava vit avgjørt møguleikan. Og so kann tað jú verða, at vit tosa um bæði trý, fýra og kanska fleiri stig, tá kappingin er av. Men eg haldi, at vit bíða við samanteljingini, til allir dystirnir eru spældir. Fyrst og fremst ræður um at taka ein dyst í senn.

# Svangaskarð besta boðið

**Hóast tosað hevur verið um dyst á graslíkinum í Gundadali, so heldur Brian Kerr, at Svangaskarð framvegis er besta staðið til heimadystir**

Beint undan ársskiftinum stóð greitt, at FSF nú sjálvt kann velja, um heimadystirnir hjá A-landsliðnum skulu spælast á grasi ella graslíki. Hetta tí vøllurin í Gundadali nú hevur allar neyðugar góðkenningar.

Landsliðsvenjarin ivast ikki í, at tað er neyðugt hjá føroyingum at fáa í lag eitt orðaskifti um evni, men sjálvur er hann eitt sindur í iva um, hvussu stórur fyrimunurin hevði verið við graslíki.

– Nýggju graslíkisvøllirnir sum tann í Gundadali eru jú framúr góðir. Bólturin ferðast skjótt, og tú verður ikki bilsin um, hvussu hann støkkur í vøllinum. Og tí ivist eg, um hetta hevði verið nakar fyrimunur hjá okkum. Og so eru tað eisini sitiplássini, sum jú eru rættiliga avmarkað í tali.

– Og skal eg sjálvar taka útgangsstøði í seinasta heimadystinum, sum var móti Litava, so eri eg sjálvandi ikki í iva. Svangaskarð er vøllurin, har vit hava fingið bestu úrslitini. Ikki bara móti Litava, men eisini móti eitt nú Skotlandi. Tað er eitt stað, har mótstøðuliðini ikki dámar at fara, og tað haldi eg, at vit eiga at gera okkum dælt av. Tað er jú tað sama, sum tá vit spæla móti stóru tjóðunum, og tey leggja dystin langt frá meginøkinum. Tað nervar okkara fyrireikingunum, so eg dugi ikki at síggja, hví vit ikki skulu nýta somu snildir, tá vit fyrireika okkara landslið, sigur Brian Kerr.

**mørk**